


*B71 tapti hesa ferð 6-0 fyri Víkingi. 18 mál eru farin ígjøgnum í bara fýra landskappingardystum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Verjumúrurin er rapaður

**FÓTBÓLTUR** Mótstøðuliðini hava skotið 18 mál í fýra landskappingardystinum móti sandoyingum í hesum kappingarárinum. Tað er líkt til, at B71 fær tað sera trupult í hesum kappingarárinum

| | |
|---|---|
| B71 | 0 |
| Víkingur | 6 |

Uni Holm Johannesen

Uppleggið hevur verið týðiligt, tá sandoyingar hava spælt millum teir bestu í føroyskum fótbólti. Tað snýr seg um at sláa manngarð á brotsteigarleiðini, tá mótstøðumenninir eru á bóltinum. Stríðshugurin hevur oftast verið góður. Eingin himprast at tveita seg í nærdystirnar og krøkja bóltin til sín. Tað riggaði somikið væl í fjør, at B71 skavaði sær 23 stig saman og varðveitti sætið í bestu deildini.

> **Spurningurin er, um B71 fara at standa seg eins væl á nýggja gralíkinum, sum minnir um hinar vøllirnar í landinum**

Tað hevur verið fullkomiliga øðrvísi fyrstu landskappingardystirnar í ár. Verjumúrurin er fullkomiliga rapaður. KÍ, B36, HB og Víkingur hava skotið 18 mál í alt móti sandoyingum. Keðiliga byrjanin fyri B71 hevur eisini havt við sær, at Sigfríður Clementsen, fótbóltsviðmerkjari, hevur greiða støðu.

– Sandoyingar fáa tað sera trupult. Tað skulu kollveltandi broytingar til, um liðið skal sleppa undan niðurflyting, sigur hann.

At stríðast fyri at sleppa undan niðurflyting hevur verið leikluturin hjá sandoyingum í fremstu røð seinastu nógvu árini.

### Símin er burtur

Tað hava verið nakrar skiftingar í spælarahópinum hjá Piotr Krakowski í vetur. Símin Hansen og Mikkaj Hentze er ikki partar av hópinum. Tijani Mohammed, Joseph Bassene og Símun Rógvi Hansen eru komnir afturat hópinum.

Tað er serliga saknur í Símini Hansen, sum gekk undan hjá sandoyingum í fjør. Hann hevur sjálvsagt ikki skava 23 stig saman einsamallur. Hansara eginleikar sum fótbóltsspælari, og ikki minst at blæsa lív í viðspælararnar, eru hinvegin nógv saknaðar inni í Dal.

Tað er eingin, sum hevur tikið á seg tann leiklutin higartil. Tað er tørvur á einum undangongumanni, sum treiskast eftir bóltinum, sama um B71 er á odda ella aftan fyri við tveimum málum.

Tað ber eisini illa til at savna allar spælararnar saman til venjingar. Sandoyingar hava eisini verið noyddir at fyrireika seg á graslíkisvøllinum við Eysturskúlan í Havn. Fleiri av spælarunum búgva í høvuðsstaðnum, og tað verður strævið hjá teimum at venja á Sandoynni.

### Vøllurin er skiftur

Tá tað stundaði til kappingarbyrjan varð vøllurin skiftur á Sandi. Tað var neyðugt, um felagið framvegis skuldi spæla sínar heimadystir á heimavølli. Tað var á gamla graslíkinum, at sandoyingar hava skavað flestu stigini saman. Spurningurin er, um B71 fara at standa seg eins væl á nýggja gralíkinum, sum minnir um hinar vøllirnar í landinum. B71 spældi mánadagin á nýggja graslíkinum fyri fyrstu ferð. Tað hilnaðist illa.

Víkingur bukaði sandoyingarnar. Gestirnir fingu seks mál, og heimaliðið fekk einki. B71 formáddi sær ikki nógv. Teir ljósabláu vóru avgjørdir í nærdystunum, teir vóru skjótari á bóltinum, og teir fluttu væl fyri hvør øðrum.

Kaj Leo í Bartalsstovu var trífaldur málskjútti. Hanus Jacobsen, Bárður J. Hansen og Finnur Justinussen skutu hini málini.

### Hugburðsbroyting

Stríðshugurin hjá sandoyingum var bjargingin í fjør. Tað eydnaðist at bróta niður spælið hjá mótstøðumonnunum. Tað hevur ikki hilnast higartil. Mótstøðuliðini hava havt lætt spæl, og spælararnir hjá Piotr Krakowski hava ikki verið eins raskir at runnið eftir bóltinum.

Tað er neyðugt við hugburðsbroyting, um kappingarárið hjá B71 skal hilnast eins væl og í fjør.

*uni@sosialurin.fo*

## Flott fótbóltsspæl

**FÓTBÓLTUR** Jógvan Martin Olsen, venjari hjá Víkingi, er væl nøgdur við fótbóltsspælið, Víkingur legði fyri dagin hesaferð

Uni Holm Johannesen

– Tað riggar væl at spæla okkum ígjøgnum, og vit enda flestu álopini við einum máli. Eg eri væl nøgdur við okkara álopsspæl hesaferð.

Tað sigur Jógvan Martin Olsen. Venjarin hjá Víkingi er sera væl nøgdur við álopsspæli hesaferð.

– Tað eydnast at fáa sandoyingarnar at renna aftaná okkum, og tað er hugaligt, sigur hann.

Víkingur hevur nú skavað sær sjey stig saman í alt.

*uni@sosialurin.fo*